**Fýra borgarar, sum búgva á Egholmstrøð í Havn, hava vent sær til limirnar í byggi-og býarskipanarnevndin i hjá Tórshavnar kommunu og borgarstjóran, Jan Christiansen, tí teimum líkar ikki ætlaninar um at byggja íbúðir trøðni**

MÓTMÆLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Borgarar, sum búgva á Egholmstrøð, halda lítið um ætlaninar at byggja 12 íbúðir á trøðni. – Okkara eftirkomarar skulu ikki uppliva Havnina sum ein bý, har alt grønt er farið undir betong og asfalt, siga teir*

# Ímóti íbúðarbygging á Egholmstrøð

Ein byggimeistari í Havn hevur søkt Tórshavnar kommunu um loyvi at byggja fleiri íbúðir á einum matr. nr., sum eitur 720b á Egholmstrøð. Hetta er grundøkið, sum Torvald Poulsen seldi Tórshavnar kommunu og læt ágóðan fara í grunn, sum skuldi veita styrk til útbúgving av ungum føroyingum við listarligum gávum.

Teir fýra borgararnir, sum nú hava vent sær til Tórshavnar kommunu, eru Øssur Dam Jacobsen, Hjalmar Jacobsen, Petur Egholm og Claus Reistrup.

Málið byrjaði tíðliga á sumri 2003, tá ið borgarar við Egholmstrøð frættu sum leysatíðindi, at byggimeistari hevði í umbúna at byggja íbúðir á trøðni.

Skriv varð sent Tórshavnar kommunu um hetta mál, 25. mai 2003, men ikki fyrr enn 22. oktober í ár fingu borgararnir svar. Í svarinum vísti kommunan á brævið, sum varð sent næstan hálvt annað ár frammundan.

- Í brævinum, 22. oktober, upplýsir kommunan, at ein byggimeistari í Havn hevur søkt um loyvi at byggja 10 íbúðir á 74,7 fermetrar og tvær íbúðir á 40 fermetrar.

Teir fýra borgararnir vísa á, at flestu munnu kenna grundøkið, sum Torvald átti á Egholmstrøð, tí hann hevði ein so vakran urtagarð á økinum.

Eftir at kommuna hevur svarað og hevur kunnað um byggiætlaninar, hava borgararnir enn einaferð vent sær til kommununa.

– Vit halda ikki, at gøtan, Egholmstrøð, er egnað til meira ferðslu. Bilar standa altíð parkeraðir á vegnum, og hetta er eitt nú orsaka av vánaligu parkeringsviðurskiftunum í Fjósagøtu og Sornhúsgøtu. Haraftrat kemur, at parker-ingsplássið, sum var við bakaríið hjá Gunnleivi, er vorðið til privat parkeringspláss.

Borgararnir vísa á, at vegurin, Egholmstrøð, eisini verður nýttur til spælipláss hjá børnunum, sum búgva fram við vegnum.

– Jansstovugøta, sum er framhald av Egholmstrøð oman til byrgingina við Rasmus Effersøegøtu, er ikki gjørdur til ferðslu. Vegurin er tilsamans 6,85 metrar breiður, og eingin gonguteigur er fram við vegnum.

Teir siga, at hóast kommunan læt gera fimm parkeringspláss í Jansstovugøtu, standa framvegis bilar parkeraðir í gøtuni orsaka av teimum trongu viðurskiftunum.

– Vit halda, at ferðsluviðurskiftini á Egholmstrøð eru vánalig undir verandi umstøðum – og koma einir 24 bilar aftrat til tær 12 íbúðirnar umframt vitjandi bilar, verða ferðsluviðurskiftini ótolandi.

Í brævinum til Tórshavnar kommunu, 24. oktober, vísa borgararnir á, at økið hjá Torvaldi Poulsen altíð ligið sum ein vakur, grønur blettur tætt við miðbýin, og kommunan hevur eisini brúkt nógvar pengar upp á at hampa og gera økið millum Rasmus Effersøegøtu og gamla urtagarðin hjá Torvaldi grønt og hugnaligt.

– Hesi bæði økini tætt við miðbýin kundu verið eitt gott dømi um, at Tórshavnar kommuna gongur á odda fyri at skapa skipaðar, grønar blettir mitt í Havnini, so okkara eftirkomarar ikki skulu uppliva Havnina sum ein bý, har alt grønt er farið undir betong og asfalt.

Borgararnir siga, at teir síggja fram til, at Tórhavnar kommuna fer at loysa hetta málið á slíkan hátt, at samlaða økið ikki verður ovbyrjað av ferðslu av óumhugsaðari íbúðarbygging, samstundis sum økið 720b framvegis kann vera ein grønur blettur, ið verður liggjandi sum eitt vakurt minni um Torvald Poulsen og áhuga hansara fyri føroysku listini.

# Hava roynt at keypt økið aftur

**- Eg kann vátta, at vit hava roynt at fingið hendur á økinum aftur, men higartil hevur tað ikki eydnast, sigur Heðin Mortensen, formaður í byggi-og býarskipanarnevndin i hjá Tórshavnar kommunu**

EGHOLMSTRØÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Heðin Mortensen er formaður í byggi- og búðarskipanarnevndini hjá Tórshavnar kommunu.

Hann sigur í stuttari viðmerking til málið um Egholmstrøð, sum vit umrøða á hesi síðuni, at ein samdur meiriluti í Tórshavnar býráði hevur verið í samráðingum við eigaran av umtalaða grundøkinum, sum er Hanus Olsen, byggimeistari.

– Eg kann vátta, at vit hava roynt at fingið hendur á økinum aftur, men higartil hevur tað ikki eydnast. Vit eru ikki komnir ásamt um prís, ei heldur nakað annað, sigur Heðin Mortensen.

Hann vísir á, at eftir at kommunan hevði keypt nevnda matrikkulnummar frá Torvaldi Poulsen, lýsti kommunan tað til sølu.

### 12 í búðir

- Hanus keypti matrikkulnummarið fyri einum 2-3 árum síðan og søkir nú kommununa um at sleppa at byggja 12 íbúðir har.

Heðin Mortensen vísir á, at kommunan kann ikki taka matrikkulnummarið frá manninum aftur, men hevur áhuga fyri at keypa tað aftur, um partarnir koma ásamt um eina líkinda avtalu.



*- Hanus Olsen, byggimeistari, keypti matrikkulnummarið fyri einum 2-3 árum síðan og søkir nú kommununa um at sleppa at byggja 12 íbúðir har, sigur Heðin Mortensen, formaður í byggi- og býarskipanarnevndini*

– Tað er ein samdur meiriluti í býráðnum, sum fegin vil hava økið aftur, men tað er so ikki eydnast higartil, sigur formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini hjá Tórshavnar kommunu.



# Royna av øllum alvi at fella borgarstjóran í Havn

**– Nevndin í Starvsmannafelagnum hevur sett sær fyri at fella bæði meg og alla býráðssamgonguna í Havn, sigur Jan Christiansen**

BÝRÁÐSVAL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Borgarstjórin í Havn er í øðini inn á Starvsmannafelagið. Hann heldur, at Starvsmannafelagið er farið út um alt mark. Men hann sigur, at nevndin misbrúkar felalgið til at renna ørindi fyri ávísar flokkar í býráðnum*

– Nevndin í Starvsmannafelagnum hevur sett sær fyri at fella bæði meg og alla býráðssamgonguna í Tórshavnar Býráð.

Tað er borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen, púra vísur í.

– Øðrvísi kann framferðin hjá Starvsmannafelagnum ikki tulkast, sigur hann. Jan Christiansen vísir til ætlanina hjá Starvsmannafelagnum, sum varð umrødd í Sosialinum í gjár og sum eisini verður viðgjørt í seinasta Starvsblaðnum um at leggja øll trætumál ímillum felagið og Tórshavnar býráð fyri Føroya Rætt.

Í hesum sambandi vísir Starvsmannafelagið á, at tað er heilt ógjørligt at samskifta við Tórshavnar Býráð.

Og felagið hevur enntá sent øllum býráðslimum bræv fyri at vita, hvørja støðu teir hava til starvsfólkapolitikkin hjá Tórshavnar Býráð.

– Hetta er at fara langt út um alt sømiligt mark, tí teir einstøku býráðslimirnir hava als onki við starvsfólkapolitikkin hjá býráðnum at gera.

Jan Christiansen vísur á, at Tórshavnar Kommuna er limur í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum og nógv av ósemjunum hava sostatt onki við Tórshavnar Býráð serskilt at gera.

Og hóast Jan Christiansen er formaður í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, merkir tað ikki, at hann bara kann hugsa um Tórshavnar Kommunu einsamalla. Hann hevur eisini hinar kommunurnar, og skattaborgarans pening, at hugsa um.

Hann vísir eisini á, at tað ber ikki til, at hann treytaleyst skal bakka, hvørja fer Starvsmannafelagið setir eitt krav fram.

Somuleiðis vísur hann á, at higartil veit hann bara um eitt mál, sum er lagt fyri rættin. Tað er eitt mál, sum er lagt fyri gerðarrættin, men har eru tað Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, sum eru mótpartar.

– Annars síggi eg tað ikki sum nakað negativt, at mál verða løgd fyri rættin. Tað er ómøguligt at samskifta við Starvsmannafelagið og tí kann rætturin verða eitt hent amboð at fáa greiði á nøkrum ósemjum. Tí havi eg staðiliga heitt á Starvsmannafelagið um at leggja tær ymsu ósemjurnar fyri rættin, so at vit fáa tær avgreiddar.

Borgarstjórin í Han vísir eisini á, at Starvsmannafelagið er heilt burturúr trupult at samskifta við afturímóti øllum hinum feløgunum, hann samskiftir við.

### Misbrúka Starvsmannafelagið

– Men at nevndin í Starvsmanannafelagnum nakrar vikur undan býráðsvalinum alment hóttir býráðið við sak-armálum og skrivar býráðslimum bræv nakrar vikur undan býráðsvalinum, er beinleiðis at misbrúka felagið til eitt partapolitiskt endamál.

– Og tað politiska endamálið er at fella bæði meg sum borgarstjóra og býráðsmeirilutan sum heild.

Men hetta kemur ikki óvart á Jan Christiansen.

– Hetta hevur verið mín greiði varhugi, líka síðani eg fyrstu fer samráddust við Starvsmannafelagið, tí vit hava onki samskifti havt, uttan at Starvsmannafelagið hevur hótt býráðið við øllum landsins ólukkum, makka vit ikki rætt.

Jan Christiansen sigur, at hetta vísir, hvussu lítil álvari er í nevndini í Starvsmannafelagnum.

Hann heldur somuleiðis, at Tórshavnar Býráð hevur ein góðan og sunnan starvsfólkapolitikk og ger, hvat tað kann, fyri at skapa trivnað.

– Ì hesum døgum verður nógv fólk sagt úr starvi, bæði hjá tí almenna og í privatu vinnuni. Men Tórshavnar Býráð hevur longu boðað starvsfólkinum frá, at næsta ár verður ongin sagdur úr starvi av fíggjarligum orsøkum, sigur Jan Christiansen.

Hann sigur, at tað er við beráddum huga, at býráðið hevur boðað fólkinum frá hesum.

– Tað gera vit, tí vit eru góð við okkara fólk og vilja ikki skapa ótryggleika, sigur Jan Christiansen.

# Samgongan kláraði ikki at halda sítt lyfti

**– Fiskavirkini í útjaðaranum eru illa fyri og nú vil Hergeir Nielsen hava at vita frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, nær ætlanin er at halda lyftið um at hækka flutningsstuðulin**

FLUTNINGSSTUÐUL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hergeir Nielsen sigur hóast samgongan meiri enn einaferð hevur lovað at hækka flutningsstuðulin, er enn onki hent og nú vil hann hava at vita, nær samgongan er før fyri at halda sítt lyfti*

– Samgongan hevur lovað at hækka flutningsstuðulin til fiskaflutning. Men hetta lyftið hevur hon ikki hildið. Hergeir Nielsen, løgtingsmaður úr Suðuroy, vil nú hava at vita, hvørjar ætlanir, samgongan hevur við flutningsstuðlinum.

Næstu ferð høvi býðst, fer hann sostatt at spyrja landsstýrismannin í fiskivinnumálum, hvat ætlanin er við flutningsstuðlinum.

Hann vísur á, at tað kostar 45 oyru at flyta eitt kilo av fiski um Suðuroyarfjørð, men at flutningsttuðulin er 14-15 oyru.

– Eyðsæð er, at tað er kappingaravlagandi at virka fisk í útjaðaranum undir tílíkum umstøðum, og at ein loysn má finnast sum skjótast.

Hergeir Nielsen minnir á, at tíðliga í vár segði formaðurin í vinnunevndini (Hendrik Old, blaðm.), at samgongan hevði avtalað at hækka stuðulin.

– Men so var ikki. Eitt var at játtanin ikki hækkaði, men hon lækkaði í mun til undanfarin ár, sigur Hergeir Nielsen.

– Í juni mánaða segði formaðurin í vinnunevndini, at nú hevði hann mist tolið, og at kunngerðin um flutningsstuðul skuldi setast í verk fyrsta dagin.

Men so var ikki, og enn er onki hent við flutningsstuðlinum, hóast árið nú er farið at halla.

Hann leggur afturat, at sokallaði Suðuroyarbólkurin hjá samgonguni hevur havt ein fund um vinnuligu støðuna í Suðuroynni, og tað var 25. mars í ár.

– Nú tveir mánaðar eru eftir av árinum, tykist flutningsstuðulin at vera sleptur, og virkini í útjaðaranum eru illa við av, at játtaður stuðul ikki verður útgoldin. Løgtingsmaðurin vil tí hava landsstýrismannin í fiskivinnumálum at greiða frá, hvørjar ætlanir hann hevur á hesum øki, og nær hann sær seg føran fyri at seta kunngerðina um í gildi um at hækkaflutningsstuðulin.

## Flutningsstuðulin í tølum

Í spurningi sínum til landsstýrismannin í fiskivinnumálum, vísir Hergeir Nielsen á, at í 2000 vórðu 3,436 milliónir brúktar til flutningsstuðul, í 2001, var stuðulin 3,726 milliónir og í 2002 var hann 3,676 milliónir.

Í fjør vórðu 2,5 milliónir settar av á fíggjarlógini til flutningstuðul, men bara 1,950 millión varð brúkt.
Í ár eru aftur 2,5 millión settar av til flutningsstuðul á fíggjarlógini.

Samstundis vísir eitt yvirlit, at higartil í ár eru bara slakar 800.000 krónur brúktar til flutningsstuðul.
Sostatt verður tað so langt frá, at játtanin í ár fer at verða brúkt upp.

Men tað er ógvuliga ymiskt, hvussu stuðulin er býttur ímillum tey ymsu økini í landinum.

Tað er eisini ymiskt, hvussu stórur flutningsstuðulin er fyri hvørt kilo.

Tað sæst, at nógv mesti flutningsstuðulin verður latin í Eysturoy og har verður eisini nógv mesti fiskurin virkaður av tí, sum hevur rætt til flutningsstuðul.

Niðanfyri sæst yvirlitið yvir, hvussu flutningsstuðulin er býttur sundur ímillum tey ymsu økini i landinum higartil í ár.

**Flutningsstuðul 2004**
Stuðul latin higartil í ár, fyri fisk fluttur til hesi øki:

| | **kilo** | **kr/kg** | **krónur** |
|---|---|---|---|
| Norðoyar | 1.922.608 | 0,07 | 140.188,64 |
| Eysturoy | 4.923.838 | 0,07 | 349.199,99 |
| Streymoy | 816.320 | 0,08 | 67.912,52 |
| Vágoy | 876.789 | 0,06 | 48.369,25 |
| Sandoy | 264.279 | 0,10 | 25.225,03 |
| Suðuroy | 1.084.182 | 0,15 | 167.013,31 |
| **Tilsamans** | **9.888.016** | **0,08** | **797.908,74** |